

www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 09 - 2012

# Vilja hava oljufrítt øki í Norðsjónum

Norska veðurlags- og dálkingarstýrið, Klif, mælir til at banna øllum olju- og gassvirksemi í einum 25 kilometrar breiðum geira út frá landi í Norðsjónum. Endamálið er at avmarka ávirkanina, sum olju- og gassvirksemið hevur á vistfrøðina í sjónum, og tí mælir stýrið til at verja gýtingarleiðir hjá fiski og leiðir, har sjófuglur og súgdjór halda til um veturin. Uppskotið hjá Klif stendur í einum hoyringarsvari frá stýrinum í sambandi við arbeiðið at gera eina nýggja umsitingarætlan fyri Norðsjógvin og Skagerrak. Sambært Aftenposten vísir veðurlags- og dálkingarstýrið á, at sum er er eingin olju- ella gassframleiðsla í tí umrødda økinum. -Men sjálvt um einki tílíkt virksemi er har nú, so er eingin viðtøka, sum forðar fyri, tat kann koma í framtíðini, sigur Klif-stjórin, Ellen Hambro, við blaðið. Oljuídnaðurin er ímóti Hugskotið um eirtt oljufrítt øki í Norðsjónum er ikki fallið í góða jørð hjá oljuídnaðinum. -Hetta er ein løgin og óneyðug skipan. Vit arbeiða út frá tí prinsippi, at umhvørvishóttanin frá okkara virksemi skal ikki vera størri inni við land enn úti á havinum, sigur kunningarstjórin hjá Oljeindustriens Landsforening, Tom Gederø, við Aftenposten. -Hetta ger, at tess nærri landi vit arbeiða, tess strangari eru tilbúgvingarkrøvini, og so mikið skjótari skal tilbúgvingin virka. Tí duga vit ikki at síggja nakra orsøk til at fremja uppskotið um oljufrítt øki og at avmarka tíðarskeiðið, nær borast kann. Vit fara tvørturímóti at gera okkara, fyri at hetta ikki skal koma við í ta nýggju umsitingarætlanina fyri Norðsjógvin og Skagerrak, sigur OLF-talsmaðurin.